## Lítið arbeiðsloysi

Tað er ikki bara her hjá okkum, at arbeiðsloysið er minni enn vanligt. Í Noregi hevur arbeiðsloysið ikki verið so lítið síðani á sumri í 1988. Tey seinastu tølini siga, at 2,0 prosent av teimum arbeiðstøku eru arbeiðsleys. Í juni í 1988 var talið 1,9 prosent. Tað er eitt sindur ymiskt frá einum landsluti til annan, hvussu tað er at fáa arbeiði. Størsta arbeiðsloysið er í Finnmørkini, har tað er 3,6 prosent. Í Rogalandi er tað minst, 1,5 prosent.

## Kommuna rópar neyðarróp

Kommunustýrið í grønlendska býnum Aasiaat rópar neyðarróp og vil hava landsins myndugleikar at taka onkur stig fyri at basa tí ovurstóra arbeiðsloysinum í kommununi, sum stendst av, at Royal Greenland hevur stongt rækjuvirkið í býnum. Í einum almennum brævi skriva býráðslimirnir, at vil Royal Greenland ikki lata virkið uppaftur, men onkur annar sleppa at royna seg. Sagt verður, at 320 fólk eru arbeiðsleys í Aasiaat mú.

# Leikalund karmur um



**Bókhandil, fløguhandil, kafé og listaframsýningarhøli. Leikalund er eitt stað, sum fólk í Klaksvík kunnu vera stolt av at eiga. Í sambandi við at skaldskapartíðarritið Vencili er útkomið í vár, varð skipað fyri upplestri í Klaksvík tunnilsdagin**

UMMÆLI

*Kim Simonsen*
*Myndir: Vónbjørt V. Linjonsdóttir*

Í løtuni er tað tað lokali listamaðurin, Archibald Black, ið hevur eina framsýning í Leikalund við símun nýggjastu oljumálningum.

Tað var ikki komið so nógv fólk til tiltakið hendan dagin. Klaksvíkin stóð tó á øðrum endanum sunnudagin, tí ókeypis var at koyra ígjøgnum tunnilin. Bilarnir stóðu tættir, so dagurin var væl valdur til eitt slíkt tiltak. Kanska tað órógvarði eitt sindur, at tað var so nógv ferðsla uttanfyri og tí larmur.

### Framtíðarinnar vagina

Yrkjarin Oddfríður Marni Rasmussen læs fyrst ein prosatekst eftir Marius Johannesen um grunningshøvd. Síðani komu tvær heldur løgnar yrkingar um framtíðarinnar kynslív, um vaginur og penis um eini 2000 ár, hetta vóru týðingar av yrkingum eftir Denise Duhamel. Síðani læs hann eina prosayrking eftir Russel Edson frá nýggja Vencili. Yrkingarnar skuldu kanska kløkka okkum, men eg veit ikki, um tær søgdu mær nakað sum helst.

Heðin M. Klein var næstur á skránni. Hann er ein klassiskur yrkjari, ið m.a. hevur eldri norskar fyrimyndir. “Genta í hurðini” er t.d. ein vøkur yrking. Heðin er ein inniligur upplesari, og hann torir í sínum yrkingum at leggja seg á eitt kensluborið spor. Fram um hetta ber yrking hansara brá av eini modernistiskari hevd, ið eisini ger seg galdandi og so serliga orðatónleikinum, ið vit kenna frá føroysku yrkingasøguni frá fimti- til sjeytiárini, ið serliga Regini Dahl umboðaði.

### Hvørvvegir

Hanus Kamban læs tríggjar longri yrkingar. Tann fyrsta eitur »Samrøða við myrkrið«. Hon er ikki so spennandi sum tann næsta, hann læs, ið kallast »Cafe Flore«, ið er ein livandi og óvanlig føroysk yrking um kaféina í Paris á Bld. St-Germain. Eg kom eisini at hugsa um kendu kafeina Les Deux Margots á Bld. St-Germain, har André Breton, Louis Aragon og Phillipe Soupault skrivaðu »Surrealistiska Manifestið«. Fleri ferð eg fór inn har, var ikki inn komandi, og eg endaði tí hvørjaferð á Café de Flore.

Triða yrkingin hjá Hanusi var kanska hin besta a teim øllum »Hvørvvegir til Europa«, er ein góð yrking, sum eitt barokt konfektfyllishorn av heimligum og útlenskum stemningum og musikaliteti, ið megnar at samansjóða ein mjørkamorgun í Havn við Avalon og ferðir út í (huga)heim. Hanus burdi yrkt meiri.